**Talvsamband Føroya** *The Faroese Chess Federation*

Uppskot

# TALVSAMBAND FØROYA

## Tíðarskeiðið

**(1. juli 2020 – 31. desembur 2020)**

Roknskapurin er lagdur fram og góðkendur á aðalfundi felagsins hin 17. septembur 2021

___________________________

Finnbjørn Vang
Fundarstjóri

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

| | |
|---|---|
| Leiðsluátekning | 2 |
| Leiðslufrágreiðing | 3 |
| Grannskoðaraátekning frá óheftum grannskoðara | 4 |
| Nýttur roknskaparháttur | 7 |
| Rakstrarroknskapur | 9 |
| Fíggjarstøða | 10 |
| Notur | 12 |

Uppskot

## Leiðsluátekning

Tíðarroknskapurin hjá Talvsamband Føroya fyri tíðarskeiðið 1. juli 2020 til 31. desembur 2020 er góðkendur av leiðsluni.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, og at tíðarroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ogn og skyldum, fíggjarligu støðu og úrsliti.

Tíðarroknskapurin verður hervið lagdur fyri aðalfundin til góðkenningar

Tórshavn, hin 17. septembur 2021

Uppskot

| | | |
|---|---|---|
| ___________________ | ___________________ | ___________________ |
| Finnbjørn Vang<br>formaður | Katrin D. Apol<br>næstformaður | Ingolf Gaard<br>skrivari |
| ___________________ | ___________________ | |
| Ingi Wiberg<br>kassameistari | Elmar R. Fjallheim<br>nevndarlimur | |

_____________________

fundarstjóri

## Leiðslufrágreiðing

**Virksemi Talvsamband Føroya**

Talvsamband Føroya – The Faroese Chess Federation - er meginfelag fyri øll talvfeløg i Føroyum og hevur til endamáls at fremja og vekja ans fyri telving í Føroyum og at umboða føroyskar telvarar uttanfyri Føroyar. Til at røkka hesum málið, verður millum annað skipað fyri kappingum og farið verður út til skúlar at telva.

Talvsamband Føroya hevur í 2020 móttikið t.kr. 946 í stuðli frá Føroya Landsstýri, umvegis Hugaítróttur Føroya.

**Gongdin í virksemi og fíggjarlig viðurskifti**

Rakstrarroknskapurin hjá Talvsamband Føroya fyri tíðarskeiðið 1. juli 2020 til 31. desembur 2020 vísir eitt hall upp á t.kr. 199, og fíggjarstøðan hin 31. desembur vísir eina eginogn á t.kr. 560.

Talvsamband Føroya hevði í 2020 sett pening av til stóru tiltøkini, OL fyr lið, Small Nations lið og NM fyri skúlaungdóm. Hesi tiltøk vórðu øll avlýst orsakað av Covid-19, og tískil eru útreiðslurnar hjá felagnum á einum lægri støði enn vanligt, hetta hevur eisini við sær at tøki peningurin hjá felagnum er hægri enn vanligt.

Uppskot

## Grannskoðanarátekning frá óheftum grannskoðara

***Til nevndina í Talvsamband Føroya***

**Niðurstøða**

Vit hava grannskoðað tíðarroknskapin hjá Talvsamband Føroya fyri tíðarskeiðið 1. juli 2020 - 31. desembur 2020, við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi og fíggjarstøðu. Ársroknskapurin er gjørdur sambært vanligum reglum um góðan roknskaparsið, umframt eftir "Kunngerð nr. 125 frá 19. September 2011 um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan."

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu tann 31. desembur og úrslitinum av virksemi felagsins í tíðarskeiðnum 1. juli 2020 - 31. desembur 2020 samsvarandi góðan roknskaparsið.

**Grundarlag fyri niðurstøðuni**

Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og eftir øðrum ásetingum í føroysku grannskoðaralógini. Okkara ábyrgd sambært hesum standardum og krøvum er nærri lýst í grannskoðanarátekningini í pettinum "Ábyrgd grannskoðarans av grannskoðanini av ársroknskapinum".Vit eru óheft av felagnum samsvarandi altjóða etisku reglunum fyri grannskoðarar (etisku reglurnar hjá IESBA) og øðrum ásetingum, ið eru galdandi í Føroyum, eins og vit hava lokið onnur etisk krøv, sum vit hava sambært hesum reglum og krøvum. Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøða.

**Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum**

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til, fyri at gera ársroknskapin uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá ið ársroknskapurin verður gjørdur, hevur leiðslan ábyrgdina av at meta um, hvørt felagið megnar at halda fram við rakstrinum, og har tað er viðkomandi at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri og at gera ein ársroknskap eftir roknskaparásetingunum um framhaldandi rakstur, uttan so at leiðslan hevur ætlanir um at avtaka felagið, steðga rakstrinum ella um leiðslan í roynd og veru ikki hevur aðrar møguleikar.

**Ábyrgd grannskoðarans av grannskoðanini av ársroknskapinum**

Endamál okkara er at fáa eina grundaða vissu fyri, at ársroknskapurin sum heild er uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, og at gera eina grannskoðanarátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa á høgum stigi, men er tó ikki ein trygd fyri, at grannskoðan framd samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og aðrar ásetingar í føroysku grannskoðaralógini, altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, um slíkir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað sviki ella mistøkum og mugu metast at verða týðandi, um tað er sannlíkt, at teir hvør sær ella saman kunnu metast at hava ávirkan á fíggjarligu avgerðirnar, ið roknskaparbrúkararnir taka við støði í ársroknskapinum.

Uppskot

Tá ið vit grannskoða samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum í føroysku grannskoðaralógini, gera vit yrkisligar metingar og varðveita professionella ivasemið undir grannskoðanini. Harumframt:

- Eyðmerkja og meta vit um váðan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og grannskoða samsvarandi hesum váða og fáa til vega grannskoðanarprógv, ið eru nóg góð og egnað sum grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri, at vit ikki avdúka týðandi feilir orsakað av sviki, er størri enn váðin fyri, at feilir orsakað av mistøkum ikki verða avdúkaðir, av tí at svik kann umfata samansvørjing, skjalafalsan, tilætlaðari dyljan, villleiðing ella at innanhýsis eftirlit verða skúgvað til viks.

- Fáa vit fatan av tí innanhýsis eftirliti, ið er viðkomandi fyri grannskoðanina, soleiðis at vit kunnu leggja grannskoðanina til rættis á nøktandi hátt eftir umstøðunum, men ikki fyri at gera eina niðurstøðu um, hvussu virkið innanhýsis eftirlitið er.

- Taka vit støðu til, um tann av leiðsluni nýtti roknskaparháttur er hóskandi eins og vit meta um, hvørt roknskaparligu metingarnar og tilhoyrandi upplýsingar frá leiðsluni, eru rímiligar.

- Taka vit støðu til, um tað er hóskandi, at leiðslan hevur valt at gera ársroknskapin grundað á roknskaparháttin um framhaldandi rakstur, og um tað, við støði í teimum grann-skoðanarprógvum, ið eru fingin til vega, er týðandi óvissa ella viðurskifti, ið kunnu elva til týðandi óvissu um, hvørt felagið megnar at halda áfram. Er niðurstøðan, at tað er týðandi óvissa, skulu vit gera vart við hetta í grannskoðanarátekningini við at vísa til upplýsingar hesum viðvíkjandi í ársroknskapinum ella, um hesar upplýsingar ikki eru nøktandi, tillaga okkara niðurstøðu. Okkara niðurstøður eru grundaðar á tey grannskoðanarprógv, ið eru fingin til vega fram til dagin, tá ið okkara grannskoðanarátekning verður undirskrivað. Hendingar í framtíðini ella viðurskifti kunnu tó elva til, at felagið ikki er ført fyri at halda fram við rakstrinum.

- Taka vit støðu til samlaðu framløguna, bygnaðin og innihaldið í ársroknskapinum, íroknað upplýsingarnar í notunum umframt um ársroknskapurin vísir transaktiónir, sum liggja undir, og hendingar á ein slíkan hátt, at tað gevur eina rættvísandi mynd.

Vit samskifta við leiðsluna um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini og nær vit vænta at grannskoða. Harumframt samskifta vit um týðandi eygleiðingar í sambandi við grannskoðanina, so sum týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, ið vit eru komin fram á í sambandi við grannskoðanina.

Uppskot

**Ummæli av leiðslufrágreiðingini**

Leiðslan hevur ábyrgdina av leiðslufrágreiðingini.
Okkara niðurstøða um ársroknskapin fevnir ikki um leiðslufrágeiðingina og vit geva ikki nakra váttan við vissu um leiðslufrágreiðingina.
Tað er okkara ábyrgd, í samband við grannskoðanina av ársroknskapinum, at lesa leiðslufrágreiðingina og í hesum sambandi meta um, hvørt samanhangur er millum leiðslufrágreiðingina og ársroknskapinum, ella um hon er í mótsøgn við ta vitan, ið vit hava fingið undir grannskoðanini, ella á annan hátt er tengd at týðandi skeivleikum.

Okkara ábyrgd er harumframt at hugsa um hvørt leiðslufrágreiðingin hevur kravdu upplýsingar samsvarandi ársroknskaparlógini.

Grundað á gjørda arbeiði er tað okkara fatan, at leiðslufrágreiðingin samsvarar við ársroknskapin, og at hon er gjørd samsvarandi krøvunum í ársroknskaparlógini. Vit eru ikki vorðin varug við týðandi feilir í leiðslufrágreiðingini.

Tórshavn, hin 17. septembur 2021

**NUMO**

góðkent grannskoðanarvirki Sp/f

Súni Schwartz Jacobsen

*statsaut. revisor*

Uppskot

## Nýttur roknskaparháttur

Tíðarroknskapurin er uppsettur sambært § 21, stk. 2 í kunngerð nr. 125 frá 19. september 2011 um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan, umframt eftir vanligum reglum um góðan roknskaparsið.

Tíðarroknskapurin verður gjørdur í samband við broyting í roknskaparárinum hjá Talvsambandi Føroya.

Av tí at talan er um ein tíðarroknskap eru eingi samanberingartøl.

Tíðarroknskapurin verður gjørd í donskum krónum (DKK).

Uppskot

**Alment um innrokning og virðisáseting**
Í rakstrarroknskapinum verða inntøkur innroknaðar, so hvørt tær verða vunnar. Sama er galdandi fyri virðisjavningar av fíggjarligum ognum og skyldum. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allir kostnaðir innroknaðir, herímillum avskrivingar, niðurskrivingar, avsettar skyldur og afturføringar, sum standast av broyttum roknskaparligum metingum av upphæddum, ið áður hava verið innroknaðar í rakstrarroknskapinum.

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini geva felagnum fíggjarligar fyrimunir, og virðið av ognini kann ásetast álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini taka fríggjarligar fyrimunir úr felagnum, og virðið av skylduni kann ásetast álítandi.

Við fyrstu innrokning verða ognir og skyldur virðisásettar til útveganarvirði. Síðani verða ognir og skyldur virðisásettar, sum greitt er frá niðanfyri um einstøku roknskaparpostarnar.

Við innrokning og virðisáseting verður atlit tikið at væntaðum tapi og váða, ið vísa seg, aðrenn ársfrásøgnin er liðug, og sum viðvíkja viðurskiftum, sum vóru til staðar við roknskaparlok.

## Rakstrarroknskapurin

**Inntøkur**
Inntøka er tikin við í rakstrarroknskapin, um rættur er vunnin til inntøkuna áðrenn roknskaparlok.

**Útreiðslur**
Útreiðslurnar eru stuðul til einstaklingar, fyriskipan av kappingum umframt aðrar útreiðslur til fyrisiting.

**Fíggjarpostar**

Fíggjarligir postar umfata rentuinntøkur og - kostnaðir. Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir verða innroknað í rakstrarroknskapin við teimum upphæddum, sum viðvíkja roknskaparárinum.

## Fíggjarstøðan

**Tíðaravmarkingar**

Tíðaravmarkingar, roknaðar undir ogn, fevna um goldnar útreiðslur, sum viðkoma eftirfylgjandi roknskaparár.

**Gjaldføri og áogn**

Áogn og gjaldføri er tikin við til áljóðandi virði.

**Tøkur Peningur**

Tøkur peningur umfatar innistandandi í peningastovnum.

**Skuld**

Øll skuld er virðisásett til áljóðandi virði.

**Tíðaravmarkingar**

Tíðaravmarkingar, roknaðar undir skuld, fevna um goldnar inntøkur, sum viðkoma eftirfylgjandi roknskaparár.

Uppskot

## Rakstrarroknskapur 1. juli 2020 - 31. desembur 2020

| | Nota | 01.07.2020-31.12.2020<br>kr. |
|---|---|---|
| Stuðul frá Hugaítróttur Føroya | | 0 |
| Sponsorar og Stuðul | | 0 |
| Søla bøkur og talvútgerð | | 22.150 |
| Søla Kappingar | | 3.700 |
| **Inntøkur Tilsamans** | | **25.850** |
| FIDE o.a. limagjald | | 0 |
| Kappingarútreiðslur | | 0 |
| Grand Prix Kapping | | 5.000 |
| Steypakapping | | 0 |
| Barnatelving | | 0 |
| NM fyri unglingar | | 4.794 |
| Talvolympiada | | 0 |
| Smátjóðir lið | | 0 |
| FM einstaklingar | | 26.221 |
| Stuðul til telving uttanlands | | 48.492 |
| Faroe Open | | 0 |
| Runavík Open | | 0 |
| Leiga | | 24.000 |
| Telefon, faks og internet | | 942 |
| Heimasíða | | 13.443 |
| Bankakostnaður | | 975 |
| Tíðindaskriving | | 7.000 |
| Fundarútreiðslur | | 4.379 |
| Telvingarútgerð | | 2.063 |
| Starvsfólkakostnaður | 1 | 78.163 |
| Avskrivað rakstrargøgn | | 7.500 |
| **Útreiðslur tilsamans** | | **222.972** |
| **Úrslit aðrenn fíggjarpostar** | | **-197.122** |
| Aðrir fíggjarligir kostnaðir | | 2.029 |
| **Ársúrslit** | | **-199.151** |
| Flutt úrslit | | -199.151 |
| | | **-199.151** |

Uppskot

## Fíggjarstøða tann 31. desember 2020

| | Nota | 01.07.2020-31.12.2020 |
|---|---|---|
| **OGN** | | kr. |
| Rakstrartól, innbúgv og onnur støðisogn | | 7.500 |
| **Materiell støðisogn** | 2 | **7.500** |
| **Støðisogn til samans** | | **7.500** |
| Goymsla | | 15.000 |
| **Vørugoymslur** | | **15.000** |
| Tilgóðahavandi landskassastuðul | | 0 |
| Onnur áogn | | 604 |
| **Áogn** | | **604** |
| **Tøkur peningur** | | **537.488** |
| **Ogn í umferð til samans** | | 553.092 |
| **Ogn til samans** | | **560.592** |

Uppskot

**Fíggjarstøða tann 31. desembur 2020**

| | Nota | 01.07.2020-31.12.2020 |
|---|---|---|
| **SKYLDUR** | | kr. |
| Fluttur vinningur | | 559.832 |
| **Eginogn** | 3 | **559.832** |
| Vøru- og tænastuskuld | | 760 |
| Onnur skuld | | 0 |
| **Stuttfreistað skuld** | | **760** |
| **Skyldur til samans** | | **560.592** |
| Veðsetingar og trygdarveitingar | 4 | |
| Hendingar eftir roknskaparárslok | 5 | |

Uppskot

## Notur til tíðaravmarkaða roknskapin

| | | 01.07.2020-31.12.2020 |
|---|---|---|
| | | kr. |
| **1** | **Starvsfólkakostnaður** | |
| | Nevndarsamsýning | 16.450 |
| | Samsýningar | 55.460 |
| | Eftirløn | 4.590 |
| | Onnur lønartengd gjøld | 1.663 |
| | Lønarendurgjøld | 0 |
| | | **78.163** |

| | | 01.07.2020-31.12.2020 |
|---|---|---|
| **2** | **Materiell støðisogn** | kr. |
| | Myndatól | 11.188 |
| | Tilgongd | 0 |
| | | 11.188 |
| | Áður avskrivað | 11.188 |
| | **Bókað virðið** | **0** |
| | Digitalútgerð | 6.880 |
| | Tilgongd | 0 |
| | | 6.880 |
| | Áður avskrivað | 6.880 |
| | **Bókað virðið** | **0** |
| | Talv útgerð | 120.420 |
| | Tilgongd | 0 |
| | | 120.420 |
| | Áður avskrivað | 105.420 |
| | Avskriving í árinum | 7.500 |
| | | 112.920 |
| | **Bókað virði** | **7.500** |
| | Útveganarvirðið tilsamans | 138.488 |
| | Avskrivað tilsamans | 130.988 |
| | **Roknskaparligt virðið 31. desembur 2020** | **7.500** |

Uppskot

## Notur til ársfrásøgnina

### 3 Eginogn

| | Fluttur vinningur |
|---|---|
| Salda 1. juli 2020 | 758.983 |
| Úrslit frá 01.07.2020 - 31.12.2020 | -199.151 |
| **Eginogn** | **559.832** |

### 4 Veðsetingar og trygdarveitingar

Ongar veðsetingar hvíla á felagnum.

### 5 Hendingar eftir roknskaparárslok

Síðan í mars 2020 hevur alheimsfarsóttin, COVID-19, ávirkað Føroyar og umheimin. Hvussu leingi farsóttin fer at vara er enn óvist. Tekin eru tó upp á at farsóttin fer at fána burtur so hvørt sum fólk verða koppsett. Neyðugt hevur verið hjá myndugleikunum at seta í verk fleiri avmarkingar, sum í størri og minni mun hava havt stóra samfelagsliga ávirkan. Fer farsóttin at vara leingi og myndugleikarnir møguliga fremja herd tiltøk fyri at minka um smittuspreiðingina, kunnu tær samfelagsligu avleiðingarnar verða munandi. Í síkum førum kann felagið verða neiliga ávirkað. Í roynd og veru er ikki møguligt at gera nakra fíggjarliga meting av teimum búskaparligu avleiðingunum á felagið av COVID-19 í løtuni.

Síðani roknskaparárslok er annars einki hent, sum kann hava týðandi ávirkan á fíggjarligu støðu felagsins.

Uppskot